## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvrihøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 17 og 20 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 17 og 20 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot av landnyrðingi ella av ymsum ættum og leygardagin turt og sólglottar, men sunnudagin møguliga ælingur. Hitin millum 16 og 20 stig.



*Tað nýggja í hesari framsýningini er, at eg havi gjørt nakrar súlur úr glasi, sigur listamaðurin*
*Mynd: Maria Olsen*

# Í fyrstuni sært tú onki

**Tróndur Patursson hevur latið upp nýggja framsýning**

LIST
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað serliga við hesi framsýningini er, at hon er gjørd eftir hølunum. Hølið er Müllers Pakkhús í Tórshavn.

– Hetta hølið hevur ein serligan dám, tí tað hevur jú verið eitt gamalt pakkhús, og húsið er lagað upp av øgiliga stórum gróti, sigur Tróndur Patursson.

Grótið er málað hvítt, meðan rúmið er fýrkantað og høgt, so tað hóskar seg væl til eina framsýning.

– Tað hevur sín egna dám. Húsið í sær sjálvum hevur eina sál. Tað nýggja í hesari framsýningini er, at eg havi gjørt nakrar súlur úr glasi, sigur listamaðurin.

Tróndur kallar hesar súlur fyri stakkar, sum minna nakað um stakkarnar, sum vit hava í bjørgunum. Tróndur hevur sjálvur ferðast nógv í føroysku bjørgunum.

– Eg havi royndt at arbeitt við einari heild við einum heildartema, men við einum heilt serstøkum stemningi, tá mann kemur inn í húsið, sigur hann.

– Tá tú kemur inn í húsið, er tað myrkt í hølunum, og tú skalt líkasum venja teg við tað. Og tá tú hevur verið inni í einar tíggju minuttir, so hevur eygað títt innstillað seg eftir ljósinum. So byrjar tú at síggja litirnar, men í fyrstuni sært tú onki – tú verður faktiskt blendaður, sigur Tróndur Patursson.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 20 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 17 |
| Lerwick | 19 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 22 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 26 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 28 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 20 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 28 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 31 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 39 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 14 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Írland fer í landsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1027 hPa. yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað.




Hátrýstið yvir Norska Havinum stendur í stað og viknar nakað. Eitt brúgvalag frá Skotlandi til Hvarvið stendur mestsum í stað og hvørvur so líðandi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/08 kl. 06⁰⁰–10/08 kl. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 15,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,+ mm –mált frá 09/08 kl. 06 ⁰⁰–10/08 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í august: 14,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini
16. aug.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. aug | 04.09 | 16.34 | 03.09 | 15.34 | 03.24 | 15.49 | 06.09 | 18.34 | 07.09 | 19.34 | 02.24 | 14.49 | 01.24 | 13.49 | 04.24 | 16.49 | 05.24 | 17.49 | 03.54 | 16.19 | 05.09 | 17.34 |
| 12. aug | 04.58 | 17.22 | 03.58 | 16.22 | 04.13 | 16.37 | 06.58 | 19.22 | 07.58 | 20.22 | 03.13 | 15.37 | 02.13 | 14.37 | 05.13 | 17.37 | 06.13 | 18.37 | 04.43 | 17.07 | 05.58 | 18.22 |
| 13. aug | 05.45 | 18.09 | 04.45 | 17.09 | 05.00 | 17.24 | 07.45 | 20.09 | 08.45 | 21.09 | 04.00 | 16.24 | 03.00 | 15.24 | 06.00 | 18.24 | 07.00 | 19.24 | 05.30 | 17.54 | 06.45 | 19.09 |
| 14. aug | 06.31 | 18.53 | 05.31 | 17.53 | 05.46 | 18.08 | 08.31 | 20.53 | 09.31 | 21.53 | 04.46 | 17.08 | 03.46 | 16.08 | 06.46 | 19.08 | 07.46 | 20.08 | 06.16 | 18.38 | 07.31 | 19.53 |

5 707265 100036 >